# Kall og svein ungi

1.
"Hvar rakst tú neyt míni?"
segði kall.
"Beint niðan í akur tín!"
segði svein ungi.

2.
"Skamm fái tú rekandi!"
segði kall.
"So fái tú biðjandi!"
segði svein ungi.

3.
"Hevði eg hildið á spóni mínum!"
segði kall.
"Staðið fastur í góma tínum!"
segði svein ungi.

4.
"Hevði tú verið flongdur!"
segði kall.
”Við mjúkari ostflís."
segði svein ungi.

5.
"Við skørpum áli!"
segði kall.
"Ryggur tín ligið undir!"
segði svein ungi.

6.
"Hevði eg hildið á knívi mínum!"
segði kall.
"Staðið fastur í lívi tínum!"
segði svein ungi.

7.
"Hevði tú hingið í berginum!"
segði kall.
"Góð lína á mær."
segði svein ungi.

8.
"Einfaldur hosnatráður!"
segði kall.
"Sjálvur tú á endanum."
segði svein ungi.

9.
"Hevði tú flotið á havinum!"
segði kall.
"Góður bátur undir mær."
segði svein ungi.

10.
"Ongar árar!"
segði kall.
"Lotið ligið at landinum!"
segði svein ungi.